# Takið av lægstu fyritíðarpensjón

Á heysti 2005 heittu tilsamans 28 fakfeløg á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum á landsstýrið og løgtingið at hækka fyritíðarpensjónirnar í Føroyum.

Feløgini løgdu serstakligan dent á at fáa landsstýrið og løgtingið at taka av lægstu fyritíðarpensjón – hetta soleiðis at tey sum nú fáa lægstu fyritíðarpensjón, fara at fáa játtað tað, sum samsvarar við miðal fyritíðarpensjón. Hóast hesa áheitan vóru ongi stig tikin í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2006 at taka av lægstu fyritíðarpensjón.

Heldur ikki í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2007 verður lagt upp fyri at taka av lægstu fyritíðar-pensjón. Lægsta fyritíðarpensjón eins og miðal- og hægsta fyritíðarpensjón hækkar í 2007 við 4%, ið er tann prosentsatsur, sum fyritíðarpensjónir hækka við árliga sambært galdandi ásetingum í fyritíðarpensjónslóggávuni.

Í 2006 fáa giftir lægstu fyritíðarpensjónistar 5.272 kr. um mánaðin ella í alt **63.264 kr.** um árið og stakir lægstu fyritíðarpensjónistar fáa 6.617 kr. um mánaðin ella í alt **79.404 kr.** í árligari pensjón. NB: Fyritíðarpensjónistar fáa onga ískoytisveiting úr samhaldsfasta eftirlønargrunninum.

Fólkapensjónin, ið er alt ov lág, er tó hægri enn lægsta fyritíðarpensjón. Ein giftur fólkapensjónistur fær 6.640 kr. um mánaðin (fólkapensjón + ískoytisveiting frá samhaldsfasta) ella í alt 79.680 kr. í árspensjón og ískoytisveiting í 2006, meðan ein stakur fólkapensjónistur fær 8.103 kr. um mánaðin ella í alt 97.236 kr. í árspensjón og ískoytisveiting í 2006.

Feløgini gera enn einaferð vart við, at tað er alneyðugt – beinanveg – at hækka lægstu fyritíðar-pensjón, soleiðis at henda pensjón í minsta lagi kemur uppá tað, sum svarar til miðal fyritíðar-pensjón, har gift ár 2006 fáa 93.840 kr. og støk fáa 108.892 kr.

Feløgini fara somuleiðis enn einaferð at gera vart við, at avlamnis- ella fyritíðarpensjón er samsýning fyri mist arbeiðsevni, og fara vit at heita á landsstýrið og løgtingið um at veita giftum og støkum somu grundarupphædd, soleiðis sum gjørt verður í londunum uttanum okkum.

Almanna- og heilsumálaráðið hevur í august mánaða 2004 roknað út, at kostnaðurin av at flyta allar lægstu fyritíðarpensjónistar upp til miðal fyritíðarpensjón einans er uml. 18 mió. kr. og at kostnaðurin av at javnstilla giftar og stakar pensjónistar einans er uml. 12 mió. kr.

Landsstýrið boðar í hesum døgum frá, at yvirskotið á fíggjarlógini verður uml. 75 mió. kr. og átti tí at verið sjálvsagt, at løgtingið og landsstýrið uttan meiri drál uppraðfesta og hækka fyritíðar-pensjónirnar.

*Tórshavn, hin 18. oktober 2006*

**Havnar Arbeiðsmannafelag**

**Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag**

**Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag**

**Føroya Arbeiðarafelag**

# Skapið samhaldsfesti í landsskattaskipanini

Landsskattaskipanin er farin av kós. Seinnu árini eru broytingar gjørdar í landsskatta-skipanini, ið hava verið til ógagns fyri vanliga arbeiðaran og vanliga lønmóttakaran, ið hevur lágella miðalløn. Henda gongd er ikki haldbar og má skattapolitikkurin broytast fyri at endurskapa álitið millum politisku skipanina og arbeiðarastættina.

Arbeiðarafeløgini vóna og vænta, at skattalættin, ið er fráboðaður fyri 2007, á hesum sinni fer til vanliga arbeiðaran og ikki sum undanfarin ár, har skattalættin serstakliga er farin til høgtlønt, ið hava inntøkur, ið liggja frá áleið 300.000 kr. til 600.000 kr. árliga.

Árslønin hjá teimum, ið eru tímalønt, liggur aloftast millum kr. 100.000 og kr. 225.000 árliga og fara vit við hesum at heita á løgtingið og landsstýrið at bera so í bandi, at landsskattastigin fyri 2007 (fíggjarárið 2007)- verður tilevnaður soleiðis, at tað vera inntøkubólkar, ið hava inntøkur millum kr. 100.000 árliga og kr. 225.000 árliga, ið **serstakliga** fáa skattalætta í 2007.

*Sambært upplýsingum hjá Fíggjarmálaráðnum hevur lønmóttakari, ið hevur havt inntøku uppá kr. 100.000 um árið, seinastu 4 árini (2003-2006), fingið ein samlaðan skattalætta uppá* ***kr. 2.460.***

*Meðan lønmóttakari við inntøku uppá kr. 550.000 um árið, seinastu fýra árini, hevur fingið ein samlaðan skattalætta uppá* ***kr. 17.445.***

Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sigur í viðmerkingum til fíggjar-lógaruppskotið 2007 at "Ekspansivi og arbeiðsskapandi fíggjarpolitikkurin seinnu árini hevur tænt sínum endamáli, men verður nú lagdur um, soleiðis at hann ikki virkar ov stimbrandi á búskaparliga virksemið." Arbeiðarafeløgini kunnu vissa landsstýrismannin í fíggjarmálum um, at ein skattalætti til lág- og miðallønir (løntakarar, ið vinna millum kr. 100.000 til kr. 225.000 árliga) ikki fer at ovurupphita føroyska búskapin, men fer einans at geva fjøld av landsins lønmóttakarum ein tiltrongdan og rættvísan fíggjarligan lætta og gera tað meira lønandi hjá lág- og miðallønum at arbeiða meira - um so er, arbeiði er at fáa - so meira peningur verður til vanligt neyðugt forbrúk.

Arbeiðarafeløgini mæla staðiliga frá, at skattalættin ikki eins og undanfarin ár, serstakliga verður givin háinntøkubólkum, ið vinna millum 350.000 kr. og 600.000 kr. árliga.

Í t.d. Danmark verður toppskattur latin av inntøku, ið liggur omanfyri kr. 318.700 árliga og halda arbeiðarafeløgini, at danska skipanin við **TOPPSKATTI á inntøkur, ið liggja omanfyri uml. kr. 315.000** eisini eigur at setast í gildi í Føroyum, hetta soleiðis at tey, ið fáa hægstu lønirnar, sjálvsagt mugu gjalda meira í skatt enn tey lágtløntu og miðalløntu. Arbeiðarafeløgini mæla tískil til, at nýggjur skattastigi verður gjørdur, har toppskattur svarandi til t.d. 36% ella 37% verður ásettur fyri inntøkur, ið liggja omanfyri uml. 315.000 kr. árliga. Á henda hátt kann tryggjast, at tey, ið hava hægstu inntøkurnar gjalda eitt sindur hægri skatt av seinastu lønarkrónunum enn tey, ið hava lág- og miðallønir. Hetta soleiðis at vit kunnu fáa eitt samhaldsfast vælferðarsamfelag, har breiðu herðarnar bera tyngstu byrðarnar.

Sambært Hagstovu Føroya vóru tað heili **12.331 føroyingar/skattgjaldarar, ið høvdu inntøkur, ið lógu í millum 100.000 kr. og 225.000 kr.** í 2004. Tað átti at verið sjálvsagt, at hesir fleiri enn 12.300 borgarar nú fáa sín rættvísa part av givnum skattalættum.

Landsskattastigin fyri 2007 má broytast, soleiðis at skattgjaldingin verður samhalds-føst, rímulig og rættvís.

*Tórshavn, hin 18. oktober 2006*

**Havnar Arbeiðsmannafelag**

**Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag**

**Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag**

**Føroya Arbeiðarafelag**

# Lóg um javnrættindi fyri minnilutar eisini í Føroyum



**BOGI DÁNIAL-SON DAVIDSEN**
Sorø Danmark

Tað er gleðiligt, at Løgtingið longu nú tekur lógaruppskotið um mismun mótvegis ymsum minnilutum uppaftur.

Tað er eisini gleðiligt, at løgmaður Jóannes Eidesgaard, løgtingslimirnir Finnur Helmsdal og Annita á Fríðriksmørk og aðrir tinglimir bæði tora at arbeiða fyri hesum máli og hava tikið stig til at taka málið framaftur. Tað er teimum øll æra verd.

Hinvegin er tað syrgiligt, at grundarlagið fyri hesum er, at ein ungur samkyndur Rasmus Rasmussen bæði hevur verið útsettur fyri áhaldandi happing og nú eisini álvarsligum og likamsligum ágangi.

Tað er eisini syrgiligt at síggja, at politivaldið ikki hevur kunnað gjørt nakað við hesa søk, tí her er ongin lóg í Føroyum mótvegis happing af samkyndum sambært varapolitiinsektør, Jón Klein Olsen. Men vit vita ikki, hvussu tulkingin hjá dómsvaldinum í Føroyum av núverandi lógum er.

Vit samkyndu gleðast yvir, at vit ikki longur verða tagd burtur. Vit koma áhaldandi fram við okkara ynskjum. Vit ynskja, at okkara lív sum menniskju skal vera sum hjá hinkyndum heima í Føroyum, á bygd og í bý, eins og uttanlands, mennandi og spennandi frá barnsbeini og til vit eldast, og at liva í friði og gleði saman við foreldrum, systkjum, vinfólkum og fólkinum sum heild.

Málið um javnrættandi var tikið upp í Sameindu Tjóðunum aftan á seinra veraldarbardaga, har nazistavaldið í Týsklandi hevði sent milliónir av jødum og í túsundatali av politisk øðrvísi hugsandi, sigoynarum og samkyndum í týningalegur, misbrúkt tey, skotið tey ella sent tey í gasskømur.

Síðani hevur ein hópur av londum tikið undir við hesum t. d. øll Norðanlond uttan Føroyar og eisini ES. Tey hava tí smíðað lógir, ið verja minnilutabólkar við at nevna teir í lógunum, í revsulógini, í javnrættislógum í tí privata lívinum og á arbeiðsmarknaðanum.

Vit eiga ongantíð at gloyma henda sorgarleik og aðrar tilsvarandi tilburðir. Við at góðtaka hesa lóg heiðra vit tey, sum hava liðið so nógv og geva núlivandi og komandi ættarliðum best møgulig livilíkindi fyri ávísar minnilutabólkar.

Tað vil á ongan hátt skaða eitt fólk at geva øllum full mannarættindi, eisini samkyndum. Tvørturímóti verður lívið lættari fyri øll, tí vit geva møguleika fyri og góðtaka, at vit mennuskju er sera fjølbroytt, og at vit ikki bert eru "rein" á ein hvønn hátt. Tað verður lættari hjá foreldrum, systkjum og vinfólkum at liva við - eisini í gleði.

Tí vil eg enn eina ferð eins og fyrr í sjónvarpi, útvarpi, bløðum, í Løgtinginum, í Landsstýrinum og í grundlógarnevndini og stjórnmálanevndini tosa fyri og arbeiða fyri, at lógin verður góðtikin. Tað verður teimum løgtingsmonnum, sum atkvøða fyri henni, til heiðurs og okkum minnilutum til gagns. Tá kunna vit gleðast yvir at búgva í Føroyum og eisini at vitja heima í Føroyum.

Petur Skeel Jacobsen, veðurmaður:

# Heilt rímilig fótbóltslíkindir



Veðrið verður heilt hampiligt hetta vikuskiftið. Leygardagin kann hitin koma upp á 10 stig. Mað verður nakað av vindi, eini 13-15 metur um sekundi, og viðhvørt upp til hvassan vind av landnyrðingi. So fótbóltslíkindini vera á eini leið, um ikki tey allar bestu.

Sunnudagin verður kaldari aftur, millum trý og fimm stig, men alt vikuskiftið lítið og onki avfall.

Í komandi viku verður uppaftur kaldari. Týsdagin og mikudagin kann roknast við, at hitin fer niður um frostmarkið um náttina, men tá verður tó eisini møguleiki fyri sólglottum.

**-rwd**